# TILTØK

**Gudstænastur**
**3. sunnudagur e. páskir**
*Vesturkirkjan:* kl. 11, Jóannis Fonsdal. Talvan gongur fyri Bláa Kross
*Christianskirkjan:* kl. 11, Hans Eiler Hammer
*Haraldssund:* kl. 11, Niels Pauli Danielsen
*Klaksvíkar Sjúkrahús:* kl. 10,
*Norðoya Røktarheim:* kl. 14.30, Elsa Funding
*Leirvík:* kl. 11 familjugudstænasta, offurdagur barnanna,
*Hellurnar:* kl. 17, Unis Næs
*Havnar kirkja:* kl. 11, Sverri Steinhólm
*Kaldbak:* kl. 12, Sonja Klein
*Hvannasund:* kl. 12, altarg., Elsa Funding
*Oyndarfjørður:* kl. 12 John Myllhamar
*Tvøroyri:* kl. 11, familju- og barnagudstænasta, Jónsvein Bech
*Eiði:* kl. 10.40 skriftamál, kl. 11 messa, Emil Olsen
***Broytt kirkjutíð:*** Frá komandi sunnudagi verður farið í kirkju á Eiði og við Norðskála kl. 11
*Miðvágur:* kl. 11, David Johannesen
*Haldarsvík:* kl. 11,
*Tjørnuvík:* kl. 12, Marjun Bæk
*Kollafjørður:* kl. 11, Mogens T. Christensen.
***Broytt kirkjutíð:*** Í Haldarsvík verður nú farið í kirkju kl. 11
*Sandur:* kl. 12, Kristiliga Sangkórið luttekur
*Húsavík:* kl. 16, sanggudstænasta við Kristiliga Sangkórinum, Jákup R. Hansen
*Vestmanna:* kl. 11, Inga Poulsen Dam
*Rituvík:* kl. 11, altarg., Meinhard Bjartalíð
*Vágur:* kl. 11 – sjónvarpað, Patrick de Neergaard
*Sandvík:* kl. 11,
*Hvalba:* kl. 12.30 Ólavur Rasmussen

**á Fløtum**
**Landavegur 98**
Bíbliugransking við Pætur M. Hansen verður mánakvøldið kl. 20. Evnið: Galatiabrævið. Øll eru vælkomin.

**Kirkju- og missiónshúsið á Argjum**
Sunnukvøldið kl. 18 Møti við luttøku av Andrass Arge og Argjakórinum.

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti og samstundis verður Barnaansing, kl. 11.30 Samvera við drekkamunni, kl. 12 Sunnudagsskúli og kl. 12 verður eisini Møti, har Símun Absalonsen talar.

**Lívdin**
**í Hoyvíkar skúla**
Sunnumorgunin á familjumøtinum kl. 10.30 talar Jens Wang um evnið »Lamb Guds« og á tilbiðjanarmøtinum talar Jógvan Zachariassen um »Nehemias: maðurin við stórum visiónum«. Barnaansing er fyri børn undir skúlaaldur á báðum møtunum. Sunnudagsskúli kl. 12. Drekkamunnur er millum møtini.
Týskvøldið kl. 20 Samkomufundur. www.livdin.fo

**Meinigheitin í Hoyvík**
*uppi á Brekku 3*
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Magnus Simonsen.
Mánakvøldið kl. 20.30 Bønarmøti.
Mikumorgun kl. 7 Bønarmøti.

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Orðsins tænasta v/ kommunión í Kerit.
Leygardagin kl. 11.30 Messa í Mariukirkjuni.
Sunnudagin kl. 11 Hámessa v/ Andrej Wydrzynski, prestur í Mariukirkjuni. Aftaná verður kirkjukaffi. Sunnudagsskúli kl. 14.

**Ebenezer**
Sunnudagin kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti, Ungdómskórið og barnakórini luttaka. Øll eru vælkomin. www.ebenezer.fo

**Samkoman Rhema**
*Staravegur 5*
Sunnudagin kl. 11 Familjumøti. www.rhema.fo

**Frelsunarherurin**
*Tórsgøta 19*
Sunnudagin kl. 11 Møti, kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn, kl. 18 Møti. Feltsersjantarnir Irena og Eyðun tala og leiða sunnudagsmøtinum. Øll eru vælkomin.
Mánadagin kl. 17 og 19 Skótamøtir.

**Meinigheitshúsið**
Leygardagur kl. 16.30 Bønarløta – kvinnur.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Tom Skaale, Manskórið syngur.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti og kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Filadelfia Landavegur 22**
Í dag kl. 17 Landsbøn.
Í morgin kl. 11 Morgunmøti v/ Sam Jakobsen, kl. 11.50 ABC. »At verða leiddur av Heilaga Andanum«. 1. partur v/ Ólavur Jacobsen og Barnagudstænasta. Kl. 18 Evangel. møti v/ Sonna Djurhuus. Mánakvøldið kl. 20 Bønarskúlin.
www.filadelfia.fo

**Dunamis – bíbliuskúlin**
Bíbliuskúladagur verður í Filadelfia, Havn leygardagin 8. mai. Lærarar verða: Agnar Wesli og Jan Erik Stenersen úr Levende Ord í Bergen. Byrjað verður kl. 9.30, bíbliudagurin endar kl. 16. Kostnaður kr. 100,- Goldið verður á staðnum.

**KFUM og KFUK í Havn**
Mánadagin 3. mai kl. 15 í KFUK: Eldrasamkoman við Palla Dalsgarð úr Skálavík.

**Roy ndarhúsið í Nólsoy**
Leygardagin kl. 14 barnamøti, kl. 16 útimøti um viðrar, kl. 20 evangeliskt møti. Kaffi aftaná.
Sunnudagin kl. 14 útimøti um viðrar, kl. 15.30 evangeliskt møti. Luttøka úr Skopun, og Tórmund og fleiri.

**Saron, Vestmanna**
Sunnudagin kl. 18 Evangel. møti við dópi, v/ Jóhan Hendrik Hansen. Øll eru hjartaliga vælkomin í Saron.

**Miðvágs Missiónshús**
Sunnudagsskúli verður sunnudagin kl. 14 og Møti kl. 18. Hjartaliga vælkomin.

**Zarepta**
Familjulegan fyri brekað verður 6.-9. mai. Tekning hjá Onnu á Dul Mørkøre tlf. 315280, teldupost: abmorkore@kallnet.fo

**Missiónshúsið í Hvalvík**
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Regin Høgnesen, trúb. Týskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.

**Hósvík**
Møti verður í Hósvíkar kirkju sunnukvøldið 2. mai kl. 18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið opið hús kl. 21 við Arna Abrahamsen.
Sunnudagin kl. 17 Møti við Einar Joensen. Barnamøti kl. 17. Vælkomin í Kelduna. www.keldan.fo

**Meinigheitshúsið á Skála**
Sunnudagin kl. 13.30 sunnudagsskúli og kl. 19 Møti við Niels J. Nielsen trúb. Evnið: Byggja brúgv. Innsamling til húsið. Aftaná møti verður drekka. Øll eru vælkomin.

**Missións- og ungdómshúsið á Glyvrum**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti, Símin Joensen talar. Innsavnan til húsið. Aftaná kaffi, te og køkur. Øll eru hjartaliga vælkomin. www.jesus.fo

**Lívsins Orð, Saltangará**
Sunnudagin kl. 17 Møti.
Mánakvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.

**Missiónshúsið í Gøtu**
Sunnukvøldið kl. 18 Møti við John Myllhamar.

**Gøta**
Ungdómsmøti verður í kirkjukjallaranum í kvøld kl. 20. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Gøta**
Tirsdag 4. mai kl. 20 Glyvra-Hanusars húsi, bibeltime v/ Peter O. K. Olofson: 1 Thess 4, 1-12.

**Thabor, Fuglafjørður**
Ungdómsmøti verður leygarkvøldið kl. 21.
Sunnudagin verður sunnudagsskúli á Kambsdali og í Thabor kl. 13.30. Kl. 18 verður møti, har Thaborkórið syngur. Ársgávan til Heimamissiónina verður savnað inn. Aftaná møti verður felags nátturði.

**Siloa, Fuglafirði**
Á fundinum sunnukvøldið kl. 18 talar Poul Færø og kvartettin í Betesda syngur. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Tabor, Toftir**
Ungdómsmøti verður í kvøld kl. 20 v/ Hans Jákup Hansen og fleiri av Argjum. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Leirvík**
Sunnudagin kl. 18 Møti við Tórhild Bjarkhamar.
Ungdómsmøti verður kl. 21 við Torleif Johannesen.

**Getsemane, Klaksvík**
Sunnudagin kl. 11 Møti. Tú ert hjartaliga vælkomin.

**KFUM og K, Klaksvík**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarløta, kl. 18 Konfirmantaveitsla, kl. 21 Ungdómsmøti.
Mánakvøldið 3. mai Sjómanskvinnuringurin. Øll eru hjartaliga vælkomin. www.kuff.fo

**Soli Deo Gloria**
Leygardagin kl. 14 Undirvísing í barnaarbeiði v/ Henny Jakobsen.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti, Henny Jakobsen talar.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn- og lovsongsløta, kl. 18 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Betania, Skopun**
Leygardagin kl. 11 møtast smáir einglar, kl. 14 Sólstrálan.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Evangel. møti. Vælkomin í Betania.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Ungdómsmøti verður leygarkvøldið kl. 21. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Vegna Barnagudstænastu verður eingin sunnudagsskúli sunnudagin. Sunnukvøldið kl. 18 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Betel, Vágur**
Tórs-, fríggja- og leygarkvøldið kl. 20 Fundur við Z. Zachariassen.
Sunnudagin kl. 11 Breyðbróting, kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 19 Evangel. fundur við Z. Zachariassen og sangkórið luttekur.
Mánadagin kl. 20 Bønarfundur.
Ónsdagin kl. 20 Uppbyggingarfundur.

**Missiónshúsið í Vági**
Sunnudagin kl. 18 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Sion, Vágur**
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti og kl. 18 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Mánakvøldið kl. 21 Bønarmøti og bønartænasta á tlf. 373777. Tú ert vælkomin at ringja um tær tørvar forbøn.

## LÆKNAVAKTIR

*Tórshavn:*
Læknavaktin tlf. 310033

*Eysturoy:*
Leygardagin 1. mai, Fuglafjørður tlf. 44 40 38
Sunnudagin 2. mai, Eiði tlf. 42 30 06

*Norðoyggjar:*
Læknavaktin tlf. 458888

*Vágar:* tlf. 332413

*Suðuroy* (norður): tlf. 371560
*Suðuroy* (suður): tlf. 373030

*Tannlæknavakt, Tórshavn*
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 10-11. Tlf. 314544.

## EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

*»Hjarta tykkara verði ikki óttafult! Trúgvið á Guð, og trúgvið á meg! Í faðirs míns húsi eru mangir bústaðir. Var tað ikki so, hevði eg sagt tykkum tað; tí at eg fari burtur at tilbúgva stað fyri tykkum. Jóh 14,1-2*

Meðan Jesus gekk her á fold, gav hann av og á lærusveinum sínum nakrar ábendingar um, at hann ikki altíð fór at vera teirra millum, men tað skiltu teir ikki. Undir teirra seinastu máltíð saman, greiddi Jesus teimum frá øllum. Hann segði teimum, at hann skjótt fór at fara frá teimum og doyggja.

Tá ið Jesus greiddi teimum frá, at hann fór at doyggja, mundi hann óivað síggja óttan í andlitum teirra, og tí troystar hann teir við orðunum: »Hjarta tykkara verði ikki óttafult! Trúgvið á Guð, og trúgvið á meg!

– Tykkum er ikki fyri neyðini at óttast, sigur Jesus og so leggur hann eina frágreiðing við.

– Tit skulu ikki óttast, men trúgva á Gud og trúgva á meg.

Henda áminning um at trúgva, skal ikki skiljast sum um teir ikki longu trúðu, men hetta er ein áminning um heilt og fult at lata seg yvir í Harrans hond í áliti á hann. Hann, sum hevði givið teimum frelsaran, skuldi nokk lata allar lutir samvirka til tað besta fyri teir.

Fyri at troysta óttafullu hjørtu teirra peikar hann á faðirhúsið við teimum mongu bústøðunum. Har er rúm fyri øllum Jesu vinum.

– Var tað ikki so, hevði eg sagt tykkum tað, leggur Jesus afturat.

Hetta er ein sera sterk váttan av tí livandi vónini, og Jesus sigur tað á henda hátt fyri at styrkja trúarinnar vón í teimum óttafullu hjørtunum.

Jesus fór frá lærusveinum sínum upp til himmals, men hann læt hvørki teir ella okkum eftir í einsemi. Jesus sigur: Tí at hvar sum tveir ella tríggir eru komnir saman í mínum navni, har eri eg mitt ímillum teirra.« (Matt 18,20).

Hann er ikki longur okkara millum á sama hátt, sum tá ið hann gekk her á fold. Men hann er ikki minni veruligur okkara millum í dag.

Jesus er farin at tilbúgva stað fyri okkum, men hann kemur eisini aftur og tekur tá síni børn heim við sær í teir ævigu bústaðir, sum hann nú fyrireikar.
Jesus sigur eitt lítið sindur seinni tey kendu orðini: »Eg eri vegurin og sannleikin og lívið. Eingin kemur til faðirin uttan við mær. Jóh 14,6

Við hesum vil hann minna okkum á, at tað er ein, og bara ein, vegur til teir ævigu bústaðir, og hann eitur Jesus Kristus. Himmalvegurin, Jesus Kristus, er opin, eisini í dag.

Tað er ein vónríkur boðskapur frá Jesusi, at okkum ikki er fyri neyðini at óttast, men at vit harafturímóti skulu trúgva á Gud og Jesus, og at vit harvið hava eina livandi vón um og trúgv á, at hann ein dag kemur aftur eftir okkum eisini...

**Jóannis Fonsdal, prestur**



# TILTØK

**Tilhaldið**
***í Tórsgøtu 21, tlf. 316491***
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
***Mánadagur 3. mai***
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10.30-18 Veving á loftinum
kl. 14-18 Kortspæl, telving, landastrok og onnur spøl. Tilmelding til døgurðan mikudag.
**Túrur í Kalsoynna mikudagin 5. mai. Vitja Húsar, Mikladal og Trøllanes. Úr Steinatúni kl. 8.10 aftur í Havn uml. 20.30 tíðina. Kostn. 200,- gjaldast áðrenn.**
***Týsdagur 4. mai***
kl. 10-11.30 Sangur, Óli Vang. Øll eru hjartaliga vælkomin
kl. 15 Suni F. Jacobsen sigur frá, tá ið hann kom til Havnar í 1945
***Mikudagur 5. mai***
Tilhaldið stongt. Túrur í Kalsoynna. Úr Steinatúni kl. 8.10 aftur í Havnini uml. 20.30.
***Hósdagur 6. mai***
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Telduprát, Brandur Petersen
kl. 14-16 Boccia í kjallaranum
***Fríggjadagur 7. mai***
Dýri biðidagur

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Eysturoyar Gongufelag**
Sunnudagin 2. mai verður gingið frá Gøtueiði og norðureftir. Vit møtast á Gøtueiði kl. 14. Staðkendur ferðaleiðari verður við á túrinum. Tilmelding er ikki neyðug.

**Tilhaldið Hugnin í Sandoynni**
Tilhaldið í Sandoynni er opið mánadag og mikudag frá kl. 14-17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Øll eru hjartaliga vælkomin.
***Mánadagin 3. mai***
Vit seyma teppini liðug. Upplestur
***Mikudagin 5. mai***
Vit spæla Føroyaspælið.
***Mánadagin 10. mai*** kemur Absalon Matras úr Klaksvík at siga frá um Rumenia. Absalon hevur verið nógvar túrar í Rumenien við ymiskari neyðhjálp og hann kemur at siga okkum frá sínum upplivilsum har.

**Fløvi – dagtilhaldið fyri pensiónistar**
*í kvinnufelagshúsinum á Glyvrum – allir pensionistar hjartaliga vælkomnir. Opið mánadag-fríggjadag kl. 15-18.*
***Mánadagin 3. mai***
Fimleikur v/ Jóhannu Troest
***Týsdagin 4. mai***
Ítriv fyri áhugað
***Mikudagin 5. mai***
Hugnaløta v/ burturluting.
***Hósdagin 6. mai***
Opið hús
***Fríggjadagin 7. mai***
Dýri biðidagur – stongt.

*Tú ført altíð ein góðan drekkamunn, somuleiðis eitt gott Guðs orð. Bløðini eru altíð til taks.*

**Dagtilhaldið í Vági**
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

**Vágs Pensionistafelag**
Vágs Pensionistafelag – felagið fyri pensionistar í Suðuroyar sunnaru helvt – hevur limafund kl. 19.00 hvønn seinasta mánadag í hvørjum mánaða. Ymiskt áhugavert er á hvørjum fundi, har tú eisini ført drekkamunn við bollum og køkum. Fundirnir verða hildnir í hugnaligu hølunum hjá Vágs Matmøðrafelag. Allir pensionistar og øll omanfyri 60 ár eru vælkomin. Gerst limur í Vágs pensionistafelag.

**Spælistovan í meinigheitshúsinum**
er opin mána-, týs- og hósdag kl. 9-12 fyri foreldur við børnum, sum ikki hava ansing.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630. Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh. tlf. 319630/61 655400.

**Føroya Heimavirkisfelag**
Postadressa: J. Paturssonargøta 24, 100 Tórshavn.
Formaður: Óluva Vilhelmsen.
T-postur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Tlf. 322686 / 319629

**NA (Anomymir narkomanar)**
Tinghúsvegur 37
NA-Fundur hvørt sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00 á Tinghúsvegnum 37.

**ACA**
(Adult children anonymous). Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 á Tinghúsvegi 37, Tórshavn. www.aca-danmark.dk.
E-mail:
acafaroeislands@hotmail.com

**AA-fundir í Havn**
**Tinghúsvegur 37**
Mánadag: kl. 20.00–21.00
Týsdag: kl. 20.00–21.15
Mikudag: Sporafundur kl. 20.00–21.00
Hósdag: kl. 20.00–21.00
Fríggjadag: kl. 20.00–21.00 og kl. 22.30–23.30
Leygardag: kl. 9.00-10.00 opin fundur. Kl. 17.00–18.00
Sunnudag: kl. 11.00–12.00.
Allir fundir eru roykfríir.
Heimasíða:
http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**Al-Anon**
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt týskvøld og hóskvøld kl. 20 og sunnudag kl. 17. Síðsta sunnudag í mánaðinum er opin speakarafundur í Al-Anon, Tinghúsvegur 37. Telefontíð er fríggja-, leygar-, sunnu- og mánadag frá kl. 19-21 á tlf. 508030.

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla lærarаíbúðin).

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Al-Anon í Vágum**
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15.
Hvønn sunnudag síðst í mánaðinum – opin fundur kl. 15.

**AA í Vági**
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.00.

**Blái Krossur – Glyvrar**
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

**Blái Krossur – Eiði**
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

**Fyribyrgingarráðið**
*Argjaboðagøta 7 · 160 Argir*
*postrúm 135 · 110 Tórshavn*
tlf. 315155 · fax 320272
Teldupostadr.:
fyribyrg@fyribyrg.fo
heimasíða: fyribyrg.fo

**Náttarravnarnir í Tórshavn**
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr. Ringið Carl 215570, Guðrið 220019, Hans Jákup 217818, Tone 261165, Ella 316261, Arni 222552.

**Lymfødemfelagið**
*Box 2113, FO 165 Argir*
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

**Føroyskir fiskimenn uttanlands**
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi. Limagjald 200 kr. um árið. Postgiro 57894.
Fø. Sparikassi 442027-8.

**Heilafelagið**
*felagið fyri apopleksi- og afasirakt*
Íslandsvegur 10
tlf. 321520
T-post: heila@post.olivant.fo

**Javni**
*Hoydalsvegur 40 · 3 hædd*
Skrivstovan hjá Javna er opin týsdag til fríggjadag frá kl. 10-14.
Tlf. nr. 314827 · faks 310557.
Vit hava eisini eina heimasíðu: www.javni.fo og t-post adressu: javni@post.olivant.fo har tit altíð eru vælkomin at senda spurningar ella viðmerkingar.

**Parkinsonfelagið**
*MBF-húsið, Íslandsvegur 10C*
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið hjá Kristinu, tlf. 317317.

**Kvinnuhúsið**
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

## KONFIRMATIÓN

Fríggjadagin 7. mai verður Uni Petersen, sonur Lív og Brestir Petersen, Esbjerg, konfirmeraður í Fædden Kirke. Konfirmatiónin verður á hesi adr.: Kornvangen 25, 6705 Esbjerg Ø.

Leygardagin 8. mai verður Barbara Gullfoss, dóttir Lailu og Louis Gullfoss, fermd í Høje Tåstrup kirkju. Adr.: Skagensgade 52, 2630 Høje Tåstrup.

## BRÚDLEYP

Leygardagin 8. mai giftast Jógvan Poulsen og Astrið Breckmann. Vígslan verður kl. 13.00 í Samkomuni Immanuel. Veitslan verður fyri innbodnum.

Leygardagin 8. mai giftast í Prestagarðinum á Sandi Petrina Hentze og Fríði Nolsøe. Døgurði fyri innbodnum verður í Slavansdali. Tey, ið vilja gleða brúðarparið eru vælkomin inn á gólvið eftir kl. 18 heima hjá teimum.

Leygardagin 15. mai giftast Súsanna Marjunardóttir og Bogi Jacobsen úr Havn. Vígslan verður í Býráðssalinum kl. 10.30. Tey, ið ynskja at gleða okkum henda dag, eru vælkomin í B36-húsið frá kl. 12-16.

Leygardagin 15. mai kl. 15.00 giftast í býráðshúsinum í Klaksvík Tóra Mørkøre og Helmar Lassen, bæði úr Klaksvík. Veitslan verður í Skálanum kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 220722, 210722, 456425, 455934 innan 1. mai.

Leygardagin 22. mai kl. 13.00 giftast í Ebenezer, Synnøve Hatlehol av Vatne, Noreg og Danjal av Rana úr Havnini. Brúðarveitslan verður í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at vera við, verða biðin um at boða frá á tlf. 312850 ella á maibryllup@hotmail.com áðrenn 5. mai.

Leygardagin 22. mai kl. 17.00 giftast á Sýsluskrivstovuni á Tvøroyri, Torgerð í Lágabø, Vágur og Páll Lervig, Leirvík. Veitslan verður í VB-húsinum í Vági kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma í brúdleyp verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 443023 ella 254931 innan 8. mai.

Leygardagin 22. mai kl. 16.00 giftast í Hvalbiar kirkju Joan Jacobsen, Hvalba og Christian Müller, Vágur. Veitslan verður í Roynhúsinum kl. 19.00. Tey, sum vilja gleða brúðarparið við at koma verða vinarliga biðin um at siga frá innan 8. mai á tlf. 375550, 375142 ella 373417.

Leygardagin 22. mai kl. 16.00 giftast í Sørvágs kirkju Jónley Lauritsen, Mykines og Hans Poulsen, Tórshavn. Veitslan verður í Dansistovuni í Sørvági kl. 19.00. Tey, sum vilja gleða okkum við at koma í brúdleyp, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 332931 ella 332398 innan 1. mai.

Leygardagin 5. juni kl. 11.00 giftast í Christianskirkjuni í Klaksvík Sonja Sólbjørg, Klaksvík og Jonhard Danielsen, Søldarfjørður. Veitslan verður hildin í Bygdarhúsinum í Leirvík. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá áðrenn 22. mai á tlf. 442099, 441199 ella 455438.

## SILVURBRÚDLEYP

26. mai hava Hjørdis og Óli Reinert, Flatnagerði 3 í Havn verið gift í 25 ár. Silvurbrúdleypsveitsla verður hildin í Pálsstovu hvítusunnuaftan 29. mai kl. 19. Tey, ið vilja gleða silvurbrúðarparið við at koma í veitslu, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 315644, 228808 ella teldupost: Hjordisreinert@meyl.fo innan 15. mai.


**HAVNAR BIO**
**Tlf. 31 19 56**
**www.bio.fo**



Leygardagin 01.05. kl. 20.15
Leygardagin 01.05. kl. 23.30
Sunnudagin 02.05. kl. 19.15
Sunnudagin 02.05. kl. 22.30



Leygardagin 01.05. kl. 18.00
Leygardagin 01.05. kl. 20.45
Sunnudagin 02.05. kl. 17.00
Sunnudagin 02.05. kl. 19.45



Leygardagin 01.05. kl. 23.00
Sunnudagin 02.05. kl. 22.00

**BIO KIOSKIN**
**Heitt Pop-Corn - Coca Cola - Góðgæti - Fóm ís - o.m.a.**